# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vit útflyta tað besta

Hetta er eitt fantastiska løgið land vit búgva í. Vit útflyta fólk, sum ikki hóska inn í mentan okkara, einligar mammur og krúnuna av blómandi ungdómi okkara.

Júst í hesum døgum letur til, at spennandi og tiltrongda ætlanin um at seta stovn eftirskúla í Hvalba, er um at fara í vaskið. Kommunurnar, sum hava stuðlað verkætlanini, hótta við at taka seg burturúr. Og fólkini handan ætlanina eru um at missa mótið og eru til reiðar at leggja kongin, um ikki politiski viljin vendir. Ein av stigtakarunum, Ólavur Rasmussen, hevur seinastu dagarnar meldað út, at tann hálva milliónin, sum samgongan ásett í fíggjarlógaruppskotinum til eftirskúlan er verri enn onki.

Talið av føroyskum skúlaungdómum, sum leita sær til Danmarkar á eftirskúla, er eftir øllum at døma fleirfaldað síðstu árini. Nútímans foreldur og børn lata sær ikki lynda eitt toluligt tilboð í fólkaskúlanum. Men kortini noyðast tey at bíða, til børnini eru somikið tilkomin, at tey kunnu sendast av landinum til eitt dygdargott útbúgvingartilboð. Í dag er ikki tað ikki nøktandi at lúka eitthvørt fólkaskúlaprógv – børnini skulu eisini mennast og hava avbjóðingar, meðan tey ganga í fólkaskúlanum, so tey eru til reiðar at halda fram í miðnámsskúlunum og at fara undir hægri lesnað. Okkara meting er, at tilboðið til tey ungu í føroyska framhaldsdeildini er ikki nóg gott, serliga tá hugsað verður um tilboðið í tíggjunda flokki. Hetta ber stóra fráflytingin eisini boð um.

Løgið, ta hugsað verður um, at komandi útflutningsvinna okkara skal vera vitan og gransking. Tá er tað ikki nøktandi at vit útflyta blómandi ungdómin, júst í teimum árum hann festir røtur. Vit vita, at tá tey fara undir hægri lesnað, fara tey flestu tíbetur av landinum. Men skulu tey kenna seg vælkomin heimaftur, skulu tey eisini kenna seg heima her – og so løgið tað ljóðar, so er tað júst í tannáringaárunum at ungdómar finna samleika sín í samfelagnum, sum verandi ein partur av einum fólki, landi, málið og einari søgu.

Vit eru ikki so rík, at vit hava ráð til at útflyta tað dýrabarasta vit eiga, nevniliga komandi føroyingar.

**Sosialurin**

## Sandoyingar og suðuroyingar eiga eisini rættin til landið



**JOHN WILLIAM JOENSEN**
formaður í Norðoya Sambandsfelag

Tað var sjokerandi at hoyra búskaparfrøðing í útvarpinum tosa um at kanna produktivitetin hjá Sandoyingum - áðrenn ein tók støðu til um hesin parturin av landinum skuldi fáa fast samband??

Forkvinnan í Demokratia var eisini siteraå fyri at siga, at íløgur í undirstøðikervið í landinum - var mannfólkapolitikkur???

Eg má siga sum er, at tað er væl líka nógv kvinnurnar, sum mannfólkini í hesum landinum, sum gera brúk og fáa gleði av undirsjóartunnlunum. Tey bleytu virðini - stór trívast - við einum útbygdum undirstøðiskervi - fólk kunnu jú búgva og arbeiða í ymiskum partum av landinum.

Hinvegin er tað kent, at tær kvinnurnar, sum hava verið í føroyskum politikki hava verið meira enn hálvkaldar yvir fyri undirsjóartunlunum - og tað var m. a. ein kvinna - sum undirstrikaði, at vit bert skuldu byggja Norðoyatunnilin - um vit høvdu ráð???

- Eg fegnist hvønn dag um, at hon ikki fekk avgerandi orðiå í hesum málinum!

Eg haldi tað vera ein órættur móti kvinnum - tá sagt verður at tær ikki eru talsfólk fyri tunlar og útbygging av undirstøðukervinum - tí í kjakinum um undirsjóartunnil til Sandoyar hava júst ein eyðsýnd kvinna staðiå á odda og víst á gongdar leiðir fyri framburði her á landi.

Sandoyar-Suðuroyartunnilin skal metast ájavnt við skúla- og heilsuverk

Skúlar og Heilsuverk standa í dag fyri størsta partinum av fíggjarlógini hjá løgtinginum, og veruleikin, er at fleiri peningur til hesi øki er ikki einstýðandi við at vit sum borgarar fáa betri tænastu - hóast tað eisini hevur alstóran týdning at hesi økið framhaldandi vera dagførd.

Men ein tunnil til Sandoynna og víðari til Suðuroynna er ein partur av tí menning, sum hetta oyggjafelag støðugt eigur at vera í.

Suðuroyingar hava eisini rætt til at vera partur av tí menning, sum restin av landinum hevur sæð - tað skylda vit okkum sjálvum.

Uppgávan hjá politikarum er tó altið ein raðfesting og sum eg kann lesa orðaskiftið í løtuni - so eru flestu politikarar fyri einum tunnli til Sandoyar - spurningurin er bara nær!

Tá løgtingið viðgjørdi verkætlanina til Vágatunnilin avgjørdi Klaksvíkar Býráð ikki at trýsta politiskt ein Norðoyatunnil ígjøgnum - júst tí ein metti tað hevði størri týdning av báðar verkætlnairnar fingu tað tíð tær skuldu hava fyri at blíva førdar út í lívið.

Her kundi eg hugsað mær, at Sandoyar tingmennirnir vóru meira at sær komnir og ikki settu alt uppá eitt breytt.

Eg ivist onga løtu í at politiska skipanin dugur at síggja tørvin á einum Sandoyartunnli - men í løtuni er umráðandi at fáa eina avtalu um nær og hvussu hann skal fremjast.

## Listin hjá Tjóðveldinum í Suðurstreymoy klárur

**Eftir 2. og 3. uppstillingarfund er Tjóðveldi tilreiðar við listanum í Suðurstreymi til komandi løgtingsval**

**POLITIKKUR**
*Árni Joensen*

Fimm kvinnur og seks menn eru á valevnislistanum hjá Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag til komandi løgtingsval. Í bókstavarøð eru valevnini:

Annita á Fríðriksmørk, løgtingslimur
Bergtóra Høgnadóttir Joensen, sosialráðgevari
Bjørt Samuelsen, frílans
Finnur Helmsdal, løgtingslimur
Høgni Hoydal, løgtingslimur og fólkatingsmaður
Ingeborg Godtfred, skrivari
Mads Andrias Winther, fyrrverandi rektari
Maud Wang Hansen, námsfrøðingur
Petur í Gong, vinnurekandi
Róaldur Jákupsson, vinnurrekandi
Sjúrður Skaale, vinnurrekandi

Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag sigur, at felagið fer beinan vegin at fyrireika valstríð, og saman við valevnunum, hinum økisfeløgunum og floksleiðsluni at brynja seg út til eitt avgerandi og spennandi valstríð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.